# Kunngerð

Samb. lóg nr. 458 frá 30. juni 1993 um fólkatingsval í Føroyum við seinri broytingum verður fólkaatkvøða um broyting í trónuarvalógini sunnudagin tann 07. juni 2009.

Atkvøðugreiðslan verður í skúlanum frá kl. 09:00 og heldur fram til kl. 20:00 ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður**
Veljarar, sum verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi fríggjadagin 05. juni 2009 kl. 12:00 greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna. Brævatkvøður skulu vera valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl. 09:00 tann 07. juni 2009.

**Valkort**
Valkort verða send øllum, ið sambært vallistan hava valrætt í Sørvágs kommunu og skulu nýtast til atkvøðugreiðsluna. Veljari, sum ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

*Sørvágur, tann 27. mai 2009*

**Valnevndin í Sørvágs kommunu**

**Oddur Petersen, form.**

Sørvágs Kommuna
www.sorvag.fo
VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 363200

## SUMBIAR KOMMUNA

# KUNNGERÐ

Samb. Lóg nr. 458 frá 30. juni 1993 um fólkatingsval í Føroyum við seinri broytingum verður fólkaatkvøða um broyting í trónarvalógini:

**Sunnudagin, tann 7. juni 2009**

Atkvøðugreiðslan fer fram á hesum støðum:

**Fyri veljarar í Sumba og Víkarbyrgi:**
**á kommunuskrivstovuni í Sumba**

**Fyri veljarar í Lopra og Økrum:**
**í Bygdarhúsinum í Lopra**

Atkvøðugreiðslan fer fram millum kl 9.00 og kl. 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður**
Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøðu á kommunuskrivstovuni til og við fríggjadagin 5. juni 2009, kl. 12.00.

Brævatkvøður skulu vera valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl. 9.00 tann 7. juni 2009.

**Heimaval**
Tey, ið vegna sjúku ella væntandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima við at boða frá til kommunuskrivstovuna innan kl. 12.00 fríggjadagin tann 5. juni 2009.

**Valkort**
Gjørt verður kunnugt, at valkort verða send øllum veljarum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt.

*Sumba, tann 27. mai 2009*

**Valnevndin í Sumbiar kommunu**

**FO-970 SUMBA**
**TELEFON 370344 FAX 370114**

## Skopunar Kommuna



# Fólkaatkvøðu viðvíkjandi »ændring af tronfølgeloven« tann 7. juni 2009

Fólkaatkvøðan viðvíkjandi »ændring av tronfølgeloven« verður í Ungmannafelagshúsinum Virkinum á Sandi.

**Atkvøðutíðin verður:**
Kl. 09.00-20.00 ella soleingi veljarar møta uttan steðg, og tá ið valið verður lýst liðugt.

**Brævatkvøður:**
Veljarar í Skopunar kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 5. juni 2009.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 361349 í seinasta lagi 4. juni 2009 kl. 13.00.

**Valkort:**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til fólkaatkvøðuna viðvíkjandi »ændring af tronfølgeloven« tann 7. juni 2009, verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni (tlf. 361349 ) frá í seinasta lagi 4. juni 2009.

*Skopun, 27. mai 2009*

**Skopunar Kommuna**
Skúlavegur 5
FO-240 Skopun

**umhvørvisstovan**
ENVIRONMENTAL AGENCY

## ADRESSUR Í HÚSA KOMMUNU

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur, er adressuskráin fyri bygdirnar Húsar og Syðradalur í Húsa kommunu góðkend.

Skráin er almenn og tøk á www.us.fo.

**Umhvørvisstovan**
Boks 2048 · Tlf. 342400
FO-165 Argir · us@us.fo
www.us.fo



## **Ford Escape Limited** til sølu

*– 4-hjólstrektur luksusjeepur*

Ford Escape Limited við 3.0 V6 bensinmotori (200 hk). Skrásettur fyrstu ferð í juni 2007. Hevur einans koyrt 25.000 km.

Bilurin er sera væl útgjørdur og hevur m.a. 4-hjólstrekk, aut. gear, leðursetur, fløguspælara til 6 fløgur, aircondition, el-rútar, el-spegl, elførarasetur, fjarstýrt centrallás, orig. 16" alu-felgur, fartpilot, tokulyktir og takboylar.

Bilurin er sum nýggjur bæði innan og uttan og verður seldur, um hóskandi boð fæst.

**Ring 211996 ella senda ein teldupost til kho@post.olivant.fo**

# Bygningur á Hjalla til sølu

Kann brúkast til handil, skrivstovur, verkstað o.a.

Fígging kann evt. útvegast.

**Tel. 21 73 00 · lp@ognir.fo**



## Kom og steðga avrættingunum

Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

**amnesty international**
www.amnesty.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!